












# Góð gávuhugskot frá TelduTænastuni

TelduTænastan við Staravegin í Havn hevur spesialiserað seg í teldum og øllum sum hevur við teldur og teldutøkni at gera.

TelduTænastan er ein gomul teldufyritøka, sum varð stovnað í 1987. Tað er Regin Andreasen, sum eigur og rekur fyritøkuna.

TelduTænastan hevur alla tíðina lagt seg eftir at veita góða professionella tænastu til sínar kundar.

Fyritøkan hevur fólk við hollari útbúgving og certifisering, sum hava neyðugu góðkenningarnar til at eftirlíka tænastukrøvunum hjá kundunum.

TelduTænastan hevur eisini eina vælvirkandi tænastu- og supportdeild. Tríggjar teir fyrstu mánaðirnar eftir at kundin t.d. hevur keypt eina teldu, fær hann ókeypis tænastu til "Software" á verkstaðnum. TelduTænastan hevur eitt av landsins størstu úrvalum av brúksvørum til printarar sum t.d. blekk, tónarar, pappír o.a.

Í sambandi við jólini hevur TelduTænastan eitt stórt úrval av gávuhugskotum sum t.d. farteldur, iPod, iPad og hópin av telduspølum og eitt stórt úrval av teldutaskum. Umframt nógvar aðrar gávulutir.